tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 151 Fríggjadagur 11. august 1995 69. árgangur Krónur 7,00



## U21-liðið fekk av at vita frá góðu sviunum

*Lesið um NM-kappingina á síðu 19 & 20*

## *Skotskt olju-ráðgevarafelag*

# Mælir til gráa oljuleið millum Føroyar og UK

*–Partarnir skuldu skipað fyri einum felags kanningarøki, nú ongin loysn enn er funnin á marknaðartrætuni, fyri at sleppa í gongd. Hetta gjørdu m.a. Kuwait og Saudi Arabia, sigur skotska ráðgerarafyritøkan «Mackay Con-sultans»*

*síða 5*





# Ungdómshúsið í Havn letur upp mánadagin

*Gamla Margarinfabrikkin verður karmur um virksemið, í rúsfríum umhvørvi, hjá ungdóminumn í Havn komandi árini. Leiðari er Pauli Hansen*

*síða 9*




*Tað liðir nú so væl við seismisku kanningunum við Føroyar, at annað av skipunum, Western Hercules, varð liðugt við sín part og legði kósina aftur til Onglands ella aðrar kanningarleiðir. Her skipið við bryggju, áðrenn tað fór í farnu viku. Mynd kalmar*


## LUTASEÐILIN
**hjá TÓRSHAVNAR ÍTRÓTTARRÁÐ**

Í dráttinum 10. august 1995 vunnu hesir seðlar:

| | |
|---|---|
| Vinningur nr. 1: | nr. 21.957 |
| Vinningur nr. 2: | nr. 15.675 |
| Vinningur nr. 3: | nr. 16.716 |
| Vinningur nr. 4 | nr. 6.921 |
| Vinningur nr. 5: | nr. 3.728 |
| Vinningur nr. 6: | nr. 19.168 |
| Vinningur nr. 7: | nr. 14.385 |

Vinningarnir faast við at ringja **tlf. 12380** ella **tlf. 19017.**

*Við tøkk fyri undirtøkuna*

**Tórshavnar Ítróttarráð**


### *Kent og virt skotskt ráðgevarafelag innan oljuvinnu:*

# Mælir til gráa oljuleið millum Føroyar og UK

*Nógv bendir á, at eingin loysn fæst á marknaósemjuni millum Føroyar og Bretland í bræði. Fyri at vinnan skal sleppa í gongd í tí umstríddu økinum áttu samráðingarfólkini at umhugsað møguleikan at skipa eina gráa leið, har kanningar kunnu gerast*

-Okkara uppskot er, at báðir partarnir í marknatrætuni millum Føroyar og Bretland, umhugsa møguleikan at skipa eitt felags kanningarøki - eina gráa leið, bíðandi í tí umstríddu umráðinum - t.d. á sama hátt sum Kuwait og Saudi Arabia hava gjørt tað.

Hetta eru ráðini, sum ein av teimum kendastu og mest virdu ráðgevarafyritøkunum innan oljuvinnuna, "Mackay Consultants" hevur at geva føroyingum og bretum, sum samráðast um markið millum londini.

Ráðini finna vit í seinastu frágreiðingini frá fyritøkuni, sum júst er útkomin.

Skotska fyritøkan grundar uppskot sítt á ta naggatoðn, sum er í samráðingunum og sum harvið forðar fyri kanningum í tí umstríddu økinum.

-Hetta okkara uppskot hevði ruddað slóð fyri nakað av kanningarvirksemi, meðan samráðingarnar halda fram millum bæði londini, siga ráðgevararnir hjá Mackay.

Teir vísa í frágreiðing síni á, at oljufundini vestan fyri Hetland hava økt um trýstið á samráðingarnevndirnar at finna eina loysn. Fleiri stór oljufeløg eru hugað fyri at fara undir oljukanningar júst í tí umstríddu økinum, sum liggur føroysku megin sjómarkið.

Kortini eru fá framstig gjørd í samráðingunum, hóast báðir partar hava slakað - tó ov lítið.

**Haag**

Um ikki nakað ítøkiligt fer at henda í hesum árinum er møguleiki fyri, at málið endar við dómstólin í Haag stendur í frágreiðingini, sum í høvuðsheitum er ætlað oljuvinnuni men eisini bretska almenninginum.

Ein rættarsak fer at vara í meira enn fimm ár heldur ráðgevarafyritøkan. **jan**


## Frá PIZZARIA

Hesa vikuna hava vit ser-tilboð vegna Jazz- og Bluesfestivalin.

**BLUES-PIZZA**
**(SÓS/SKINKA/OSTUR/OREGON)**
***50,- kr.***

**PIZZARIA**
**Tlf. 18866**
***(Minnist til heimkoyringina)***





**Blindastovnur Føroya**
hevur opið mánadag–fríggjadag kl. 9–16.
Telefonir: 18222 og 19288



# FERÐATILBOÐ

**Galdandi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili. Umborð á Norrönu verður gist í 4-koyggjukamari við handvaski**

TIL DANMARKAR



**Fraferð av Havnina 18. ella 25. august:**

**DANLAND Í BLOKHUS** 1 vika í frítíðarhúsi úr EINANS kr. **6.405,-**

**DANCENTER** Summarhús, 1 vika úr EINANS kr. **7.318,-**

**HERMITAGE HOTEL WEST,** Esbjerg Gisting í dupultkamari við morgunmati 1 vika ..................... úr EINANS kr. **8.046,-**

**Fraferð av Havnina 25. august:**

**DANLAND Á FANØ** 1 vika í frítíðarhúsi úr EINANS kr. **5.919,-**

TIL NOREGS



**Fraferð av Havnina 14. ella 21. august:**

**HARDANGER FERIESENTER** 1 vika í frítíðarhúsi úr EINANS kr. **5.886,-**

**BJØRNEFJORDEN GJESTETUN** 1 vika í frítíðarhúsi úr EINANS kr. **5.144,-**

1 vika í frítíðarsmáttu úr EINANS kr. **5.688,-**

**KALMAR APARTMENT & PENSION** Gisting í dupultkamari við morgunmati í 1 vika úr EINANS kr. **7.025,-**

**FLÚGV OG SIGL** Prísir úr EINANS kr. ..................... **2.118,-**

SMYRIL LINE

*Ring og hoyr meira!*
J.Broncksgøta 37
**Tlf. 15900**